# VIL VÍGA SÍTT L



**NORÐSKÁLI** – Eg hugsi ikki um, at eg nú má og skal seta meg niður og skriva ein sang. Tað kemur bara av sær sjálvum, sigur Vígdis Fjallstein av Norðskála, ið er ein av limunum í poppbólkinum FAROE5. – Eg elski tónleik, og vóni ein dag at kunna liva av tí. Kundi eg valt, so bleiv tað tað.

Snorri Brend

Tað hevur altíð verið tónleikur í lívinum hjá 21 ára gomlu songkvinnuni Vígdis Fjallstein.

Longu í barnaárum ungu vórðu fyrstu stigini tikin til tað, sum í framtíðini kann koma at gerast nakað stórt innan tónleikin.

Hon var neyvan meiri enn níggju ára gomul, tá hon av álvara byrjaði at syngja og gera egnar tekstir.

– Hetta kom ikki av ongum. Eg eri faktist uppvaksin við sangi, tí mammu dámdi sera væl at syngja og bæði babba og mamma hava altíð skrivað sangir og tættir. So her hevur altíð verið sangur og tónleikur í okkara heimi, greiðir hon frá.

Í skúlanum vísti Vígdis eisini áhuga fyri tónleiki, og byrjaði at spæla floytu og klaver, eins og hon gekk til undirvísing í sangi. Hon sang eisini somuleiðis heima við hús, og gjørdi sær tann eina dagin enntá tann ómak, at taka ein av fyrstu sangum sínum uppá band.

Nakað herfyri kom hon av tilvild fram á eina upptøku, har hon sang ein av sínum egnu sangum inni í køki teirra. Við vøkru barnarødd síni framførdi hon sangin, meðan hon spældi trummur afturvið uppá eina pappeskju.

– Hetta var ein sangur sum eg skrivaði uppundir jól hetta árið. Eg minnist tekstin enn, og ikki minst til lagið, sum forrestin var lagið til sálmin "Føgur er foldin", sigur hon við einum brosi.

Við góðu tónlistarligu barlast síni úr fólkaskúlanum, fór hon síðani á ein tónleikaeftirskúla í Danmark, har hon mentist enn meiri á hesum øki.

Næsta stig á tónleikaleið hennara var poppbólkurin FAROE5.

## Upp undir loft

Tað var í roynd og veru mamma hennara, Hansa sum sá lýsingina um ætlanina at stovna ein nýggjan gentubólk. Upptøkuroyndin varð sett til 5. apríl í 2008.

Vígdis hevði longu framført nakrar ferðir við tiltøk í kommununi. Men nú lótust brádliga upp einar nýggjar dyr til tónlistarligu framtíð hennara.

– Eg hevði ongatíð hugsað um, at eg nakrantíð slapp at syngja í einum bólki. Eg hevði bara ímyndað mær, at eg í framtíðini fór at syngja sjálv og við góðum tónleikarum afturat mær.

– Eg fór so til audition, og skal eg vera heilt erlig, so ynskti eg ordiliga at sleppa við í henda bólkin, sigur hon brosandi.

Og hon slapp við í bólkin, tí longu dagin eftir komu tey gleðiligu boðini frá stigtakarunum. - Ja, uha, tú kanst ætla at eg bleiv glað. Eg leyp næstan upp undir loft, tá eg fekk boðini.

## Respons

Vígdis hevur nógvar eginleikar. Ein teirra er tann góða røddin, sum stigtakararnir til bólkin uttan iva eisini hava lagt merki til.

– Ja, røddin, hon hevur givið mær sjálvsálit. Eg havi eisini fingið sera góðan respons frá fólki, tá eg havi sungið. Og hetta hevur givið mær hug at halda fram við sanginum, sigur hon. – Hetta hevur somuleiðis verið við til at byggja meg upp persónliga.

Tað var ikki serliga nógv tíð at gleðast um tey góðu tíðindini frá stigtakarunum: Longu eina viku seinni hittust tær fimm genturnar á



## 4+1

**Upprunaliga manningin í FAROE5 er nú broytt. Og samstundis er bólkurin broyttur frá at vera ein reinur gentubólkur, til ein vanligan tónleikabólk. Hetta hendi herfyri, tá Jónvá Ellingsgaard avgjørdi at gevast í bólkinum, og Thor Simonsen kom í hennara stað. Manningin í bólkinum er nú henda: Thor Simonsen, Lillian Dalsgaard, Ragnhild Dam, Asta Højgaard og Vígdis Fjallstein.**

## Enn ein stakfløga

*Hóast ein ikki hoyrir so nógv til FAROE5 í tí dagliga, so er bólkurin framvegis virkin. Bólkurin møtist regluliga eina ferð um vikuna til venjing, men uppundir konsertir ella í sambandi við fløguútgávu hava tær verið oftari saman.*
*Nakað herfyri høvdu tær eina konsert í Deep við nýggjum sangum, og nú er manningin eisini broytt nakað.*
*Tað næsta sum fer at henda, er útgáva av stakfløguni »Let's get crazy« seinni í hesum mánaðinum.*
*– Men tað verður helst nakað enn, áðrenn vit fara at geva eina heila fløgu út, sigur Vígdis Fjallstein.*
*Nú summarið stendur fyri durum, verða nógvar stevnur og festivalar kring oyggjarnar. Enn veit Vígdis tó ikki, um tær skulu framføra nakað í summar.*

**»Eg minnist tekstin enn, og ikki minst til lagið, sum forrestin var lagið til sálmin »Føgur er foldin«**